## DAGSINS MEINING

# Polarisering steðgar menning

Løgtingsvalið verður eftir øllum at døma eitt sambands-fullveldisval ganga vit eftir veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin og Portalin hjá Føroya Tele. Polariseringin tykist fult og heilt at hava tikið hvørkratak á veljararnar. Ræðslan – sum er úrslitið av víðgongda fullveldispolitikkinum, sum E nú í fýra ár hevur roynt at trútta niður í føroyingin, tykist hava fingið fótfesti. Eftir kanningini verða B og E størstir við ávikavist 9 og 8 tingmonnum. A fær 6 og C 7. Báðir smærri flokkarnir detta heilt niðurímillum. Tingið fær bert 30 tingfólk sambart hesi kanningini og er hon ein dyggiligur smeitur fyri samgonguna, sum hevði 18 tingfólk men sum nú bert fær 14. B og C, sum eru í andstøðu, fáa meiriluta einsamallir, 16 av 30 tinglimum.

Tað er greitt, at stóru vinnararnir eru B og E, meðan stóru tapararnir eru A og D. Men C, sum hevur verið í andstøðu øll hesi árini, fær ikki tað góða valið, sum flokkurin hevur vónað og lagt upp til, tí hann stendur í stað. Missir mannin í Norðstreymoy og fær nýggjan í Sandoynni. Tá hugt verður nærri eftir tølunum hjá B og E, sum standa hvør sínu megin á polarisetingsaksanum, er greitt, at valið fyri mong er ein spurningur um samband ella fullveldi. Hetta er spell hóast tað er skiljandi. Og skiljandi tí at E hevur skapt eina so stóra ræðslu í fólkinum við sínum víðgongda fullveldispolitikki, at tað harvið hevur rikið atkvøður úr øllum ættum inn í sambandsleirin. Og hvat skal E brúka hetta til! Slík gongd gagnar so ikki E ella teimum flokkum, sum liggja á miðjuni og vilja størri sjálvstýri.

Vit byggja einki land við sambandi ella fullveldi. Vit byggja bara land við einum hóvligum men miðvísum sjálvstýrispolitikki og einum vælferðarpolitikki, sum fevnir um okkum øll. Polariseringin steðgar í veruleikanum allari menning og hon forðar fyri, at tað verður rikin konstruktivur konsesuspolitikkur, nakað, sum vit øll hava brúk fyri, eisini B og E.

Tað er tí at vóna, at flokkarnir á miðjuni í føroyskum politikki og her er C tann størsti, megna at venda gongdini. Tað ringasta, ið kann henda fyri land og fólk er ein svart/hvít antin ella støða, við einum stórum sambandsflokki og einum stórum Tjóðveldisflokki, har tað als ikki ber til at reka ein skilagóðan politikk. Tað er tí avgerandi, at teir politikarar, sum mynda flokkarnar á miðjuni, fram til valið megna at sannføra veljararnar um, at polariseringin tænir ongum av okkum. Hon bara setir enn meira split í fólkið og ger tað uppaftur torførari at finna skilagóðar loysnir, ið lýta frameftir. Polariseringin snýr seg um samband ella fullveldi. Víðgongda fullveldistilgongdin er longu steðgað, og tí eiga allar kreftir at brúkast til at menna hetta samfelagið á øllum økjum.

**Sosialurin**

## VALGREINAR

# Eitt rættvíst samfelagsligt býti av tilfeingi

**Jan Midjord**
*valevni javnaðarfloksins í suðurstreymi*



Nú val er í hondum, tykjast valevni úr øðrum flokkum í skriving síni at leggja seg á ta leið, sum føroyski Javnaðarflokkurin stendur fyri.

Ikki so undarligt, tá tú hugsar um ta politisku hugsjón, Javnaðarflokkurin byggir sín politikk á. Tí neyvan er tað nøkur onnur hugsjón, sum so eyðsýnt tekur støði í tí at vera menniskja, sum hugsjón Javnaðarflokksins, og tí eri eg errin av at vera eitt av valevninum hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymi.

Sum valevni bjóði eg meg fram til at vera við til at fremja ta javnaðarhugsjón, sum er viljin í verki at vísa, at vit vilja eitt rættvíst samfelagsligt býti av tí tilfeingi, sum vit øll eru við til at skapa, og eftir míni bestu sannføring er javnaðarhugsjónin fremsta boð upp á eina vælvirkandi framtíð við einum samfelagsligum virði, sum kann koma øllum føroyingum til góðar.

Føroyska samfelagið er annað enn spurningurin um fullveldi ella ikki, og eg haldi at seinastu 4 árini í alt ov nógvan mun hava verið merkt av hesum spurningi, og raðfestingarnar hava tí eisini verið hareftir.

Tað hevur ikki verið rúm fyri nøktandi ábøtum innan øki, sum skulu vera við til at fremja eitt mennandi lívsvirði hjá teimum, sum av givnum orsøkum koma undir hesi øki. Eg hugsi um eitt nú heilsuverkið, ellis- og røktarheimsøkið, pensjónsøkið, skúlaøkið og onnur sosial øki.

Hesin málsetningur er m. a. nakað av tí, sum Javnaðarflokkurin ætlar sær at gera nakað við, fær hann nóg dygga undirtøku á valinum komandi.

Politikkur Javnaðarflokksins byggir á einskaka menniskjað, og tað er í einstaka menniskjanum, tú leggur gróðrarbotnin undir einum vælvirkandi solidariskum samfelag. Einum samfelag, sum vit øll kunnu kenna okkum væl í.

Tí velji eg javnaðarflokkin. Tað skuldi tú eisini gjørt!

# Ellisárini skulu vera trygg

**Sverre Midjord**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðuroy*



Tann fólkapensión, sum eldri fáa í dag er alt ov lítil, tí hevur flokkur mín sett eina ítøkiliga ætlan, hvussu hesi viðurskifti skulu betrast, soleiðis at tey eldru skulu føla seg trygg. Tað er eingin loyna, at tey eldru, sum bert hava eina fólkapensión at liva av, tey hava tað ikki gott í okkara samfelag, tey hava aftan á eitt langt og arbeiðssamt lív svarað samfelagnum tað sum varð lagt á tey av gjøldum av ymiskum slagi.

Meðan tey vóru arbeiðsfør, bar til at svara hvørjum sítt, men nú bert pensiónin er at líta á, nú sansar at, tí tann pensión sum er tillutað tí vanliga arbeiðs- og fiskimanna stætti, hon er alt ov lítil, tað er so galið, at um ein fiskimaður verður álvarsliga sjúkur, so er eingin trygging honum til bata, hann verður noyddur at fara á Almannastovuna og har er lítil hjálp at finna.

Hetta og pensiónsviðurskiftini eru ótolandi, og mugu her og nú fáast í rættlag, tí ójavnin er alt ov stórur, tað eru talandi dømi um, at sjómenn sum eru blivnir sjúkir sita á berum, tí teir onga trygging hava, hetta er ósømiligt og er ein uppgáva, sum mín flokkur fer at fáa í rættlag ongantíð ov skjótt.

Tá javnaðarflokkurin fór í samgongu í 1959 var fólkapensiónin sett sum eitt avgerðandi mál, vit fara aftur at gera tað hesaferð, tí vit fara at krevja, at fólkapensiónin verður framførd sum vit hava víst á, men vit fara eisini at hyggja at og bøta um tryggingarviðurskiftini hjá okkara fiski- og útróðrarmonnum, tey mugu fáast í rættlag, tað eru okkara fiskimenn, sum bera samfelagnum uppi, teimum skulu tryggjast bestu arbeiðskor og berst teimum vegna sjúku frá, skulu tryggingarviðurskiftini vera í lagi.

Hetta eru viðurskifti sum eg fari at virka fyri, tað verður farið í samarbeiði við teir flokkar, sum vilja vera við at fremja ítøkiligar ábøtur og trygging fyri okkara sjófarandi fólk. Tað skal tryggjast teimum ein trygg tilvera.

# Hvat við fiskimonnunum?

**Rógvi Borðoy**

Mær tykist at sjálvstýrismálið køvir alt. Valstríðið er farið í gongd, og allir flokkarnir brúka alla tíðina uppá at rættvísgera sína sjálvstýrisleið.

Men hvar eru fiskimenninir í valinum? Hvat við teirra túralongd og trygd? Hvussu við livikorunum hjá hesum 1500 monnum, sum stríðast undir korum, sum ofta eru undir alt lágmark?

Fólkaflokkurin vil í komandi valskeiði arbeiða fyri, at fiskimenn fáa somu sømdir umborð sum á landi. Trygdin skal í topp, og arbeiðsumhvørvið skal støðugt betrast, so trivnaðurin er í lagi.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# Nýggjur bústaðarpolitikkur

**Elin Lindenskov**
*Valevni Javnaðarfloksins*



Javnaðarflokkurin hevur sett sær sum mál, at komandi valskeiðið skulu byggjast 30 nýggir bústaðir til rørslutarnað, 50 nýggjar lestraríbúðir og 160 røktarheimspláss. Javnaðarflokkurin fer at broyta íbúðarpolitikkin soleiðis, at vit veruliga kunna velja, hvussu vit búseta okkum.

Tað skal gerast áhugavert hjá kommununum, almennum felagsskapum, fakfeløgum, eftirlønargrunnum, lívstrygging o.ø. at byggja leiguíbúðir, lutafelagsíbúðir og eigaraíbúðir. Hetta gera vit við at broyta lógina um rentustuðul og MVG soleiðis, at íbúðarfeløg verða frítikin fyri MVG og fáa rentustuðul á sama hátt sum sethúsaeigarar

Nýggj leigulóg, sum tryggjar rættindini hjá leigarnum skal gerast.

Vit skulu byggja leiguíbúðir, lutafelagsíbúðir og eigaraíbúðir. Lestraríbúðir skulu byggjast, har sum skúlarnir eru. Tá ið nýggir skúlar verða bygdir, skulu lestraríbúðir byggjast samstundis. Einligir forsyrgjarar og støk skulu hava møguleikan at búseta seg fyri ein rímuligan kostnað. Ung skulu hava møguleika at flyta heimanirfrá í ungdómsíbúðir. Nútíðarhóskandi bústaðir til menningartarnað og sálarliga sjúk skulu byggjast. Íbúðir skulu byggjast til eldri, sum ynskja at flyta í minni íbúð. Vilt tú hava ein nýggjan bústaðarpolitikk, so vel Javnaðarflokkin og seta X við lista C.
www.lindenskov.com

# Landsstýrismaðurin í fullveldismálum sendi føroysku tinglýsingarskránna til Danmarkar

**– og har er hon enn og ber fittar inntøkur í danskar kassar**

**Hans Pauli Strøm**
*Javnaðartingmaður fyri Norðurstreymoy*



- Ein av rúgvismiklu føroysku dataskráunum við persónsupplýsingum er tinglýsingin. Fyri tveimum árum síðani sendi landsstýrismaðurin í fullveldismálum hana av landinum til danskan stovn at umsita.
- Ein av avleiðingunum er at tinglýsingarskráin í dag verður umsitin beinleiðis í stríð við lógina. Inntøkurnar býta ríkiskassin og danskt partafelag sínámillum.

Á vári 2000 legði Høgni Hoydal landsstýrismaður lógaruppskot fram um leggja tinglýsingina á edv. Ríkismyndugleikarnir vóru í ferð við at leggja alla donsku tinglýsingina á edv, og bjóðaðu danir sær at taka ta føroysku við - uttan kostnað. Ein av avleiðingunum fór at verða, at føroyska tinglýsingarskráin so bleiv ein partur av donsku tinglýsingarskipanini, og kom at liggja á høvuðsteldu hjá datafyritøku í Danmark, umsitin og undir eftirlitið av donskum myndugleikum.

Rættarnevndin vildi ógviliga treyðugt, at tinglýsingin varð flutt av landinum. Vit vildu heldur, at gjørd var ein føroysk edv-skipan av tinglýsingini. Landsstýrismaðurin vísti tó á fyrimunin við at fáa danir til at gera umleggingina til edv skjótt og ókeypis. Og tá hann lovaði rættarnevndini, at beinanvegin skuldi farast undir at gera eina føroyska skipan, so at tinglýsingin kundi takast heimaftur til Føroya, so skjótt danir høvdu lagt hana á edv, so gav rættarnevndin seg fyri ynskinum hjá landsstýrismanninum.

**Øll tinglesingin liggur á teldu í Danmark**

Nú eru 2 ár farin, og enn liggur øll føroyska tinglýsingarskráin í Danmark. Hetta er skrá við persónsupplýsingum av størsta týdningi, tí tinglýsingin fevnir um almennu skrásetingina av øllum skjølum viðvíkjandi rættindum í fastari ogn og øðrum ognarviðurskiftum hjá persónum í Føroyum. Øll skráin sum hon er liggur nú á teldu í Keypmannahavn. Hvønn einasta seinnapart verða dagsins broytingar í føroysku tingbókini sendar av landinum til høvuðstelduna í Danmark. Og hvønn morgun verða so nýskrásettu upplýsingarnar heintaðir úr Keypmannahavn, so at avritið av tinglýsingini, sum liggur á tinglýsingarskrivstovuni í Tórshavn, kann verða dagført.

Eitt er, at hetta avdúkar ússaligheitina í fullveldisgorrinum. Verri er, at eftir nýggju kunngerðini hjá landsstýrismanninum, sum bannar útflutningi av elektroniskum viðgerðarskipanum við persónsupplýsingum, er hetta er ólógligt.

**Tinglýsingin verður umsitin í stríð við lógina**

Í uppskotinum hjá landsstýrismanninum um edv-umlegging av tinglýsingini varð skilt millum A-brúkarar (peningastovnar, advokatar, grannskoðarar o.t.) og B-brúkarar ("vanlig fólk"), sum skuldu hava ymiska atgongd til tinglýsingina. Men eftir tilmæli frá rættarnevndini varð hesin munur á brúkarunum tikin burtur, so øll skulu hava somu, javnbjóðis atgongd til hesa almennu skrá. Løgtingið setti tí nýggja §50c, sum stutt og greitt segði, at "Upplýsingar í edv-skrá eru atkomiligir hjá øllum á internetinum".

Skjótt 2 ár eru síðan hetta varð samtykt, men enn er hetta kravið í lógini ikki uppfylt.

Og tað er uppaftur verri, tí atgongdin til teldutøku tinglýsingina verður umsitin púra í mótstríð við lógina:

- Sjálv tinglýsingarskráin og praktiska umsitingin av henni liggja hjá tí danska CSC-Danmark A/S (fyrrverandi Datacentralen) og Tingbogskonverteringen í Århus, meðan eftirlitið liggur hjá Forsetanum fyri Eystara Landsrætt.
- Uttan at lógarheimild er fyri tí, skulu brúkarar, sum vilja hava atgongd til tinglýsingina um netið, biðja tinglýsingarskrivstovuni um at verða skrásettir sum brúkarar, og umsóknin skal góðkennast hjá Tingbogskonverteringen í Århus. Hetta kann taka fleiri vikur.
- Uttan at lógarheimild er fyri tí, verður av CSC A/S uppkravt eitt sonevnt íbindingargjald uppá 2000 kr, fyri at gerast internetbrúkari.
- Uttan at lógarheimild er fyri tí, skal haraftrat gjaldast til CSC A/S eitt fast mánaðargjald uppá 110 kr, umframt eitt brúkaragjald uppá 3,25 fyri hvønn byrjaðan tíma.

Øll henda mannagongdin er greitt í stríð við lógina, tí tá hon sigur, at skráin skal verða atkomilig hjá øllum, so er ikki heimild fyri at krevja serliga umsókn og góðkenning, og tað er ikki heimild til at krevja serligt haldaragjald. Lógin sigur, at tinglýsingin skal vera almenn, og ein og hvør skal uttan víðari kunna leita upplýsingar fram í edv-skránni. Skal ávíst gjald takast fyri hetta, skal tað gerast við heimild í lóg, og slík er ikki.

Fullveldislandsstýrið megnaði ikki at fáa hesi viðurskifti í rættlag. Tað verður ein av fyrstu uppgávunum hjá nýggjum landsstýri eftir valið, at fáa tinglýsingina aftur á føroyskar hendur, so hon kann verða umsitin eftir lógini og koma undir eftirlit av føroyskum myndugleikum.

**Ríkiskassin og dansk partafelag fáa inntøkurnar**

Tað hoyrir eisini við í myndina, at av tí at landsstýrismaðurin í fullveldismálum ikki hevur megnað so frægt sum at fáa tinglýsingina umsitingarliga aftur á føroyskar hendur – hóast hon varð yvirtikin sum føroyskt sermál fyri nógvum harrans árum síðani – so fær danski ríkiskassin hvørt ár stóra inntøku av tinglýsingargjøldunum. Í 1999 vóru hesar inntøkur mettar til 3,6 mió. kr. Útreiðslurnar av tinglesingini vóru tá, høgt sett, mettar til 1,8 mió. Tvs. at ríkiskassin hvørt ár fær útvið 2 mió. kr í nettoinntøku av tinglesingini – inntøkur, sum av røttum hoyra heima í landskassanum. Hvussu stórar inntøkur harumframt fella til danska partafelagið CSC A/S fyri íbindingargjald, haldaragjald og brúkaragjald, hevur ikki borið til at fingið uppspurt.

# Javnaðarflokkurin vil slóða fyri eini betri barsilsskipan og systkinaavsláttur í barnaansingini

**Eyðólv Dimon**
*Javnaðarflokkurin í Suðurstreymoy*



Barnafamiljurnar skulu hava tær bestu karmarnar. Karmar, ið tryggja børnunum ein góðan uppvøkstur, og sum geva foreldrunum møguleika at hava eitt gott og samanhangandi familju- og arbeiðslív. Hetta skal eisini umfata familjur við smáum børnum. Javnaðarflokkurin vil at barnafamiljurnar fáa eina betri barsilskipan. Fyrst skal barnsburðarfarloyvið økjast til eitt ár. Afturat hesum fer Javnaðarflokkurin at virka fyri, at í øllum kommunum verður tryggja barnafamiljum eitt ansingartilboð.

**Trygg barnaár merkir eitt betri samfelag**

Barnsburðarfarloyvið og ein trygg ansingarskipan eru treytin, um vit vilja geva børnunum tann besta startin uppá lívið. At børnini skulu fáa eina góða byrjan í lívinum er, at tey fáa meiri tíð saman við foreldrunum, og at tey fáa tryggleika í einum samfelag, sum er skipað til børn. Her mugu vit ikki vera pírin. Hetta er samstundis grundarlagið fyri einum politikki, sum vil bróta sosiala arvin. Hetta hava grannalondini lagt stóran dent á. Havast skal í huga, at allar íløgur til barnafamiljuna eru ein íløga fyri at fáa eitt betri samfelag, tí at sterk felags virðir skapa sterkan felagskap, og tey virðir, sum verða løgd í børnini í dag, eru somu virði, sum bera samfelagnum, tá børnini sum vaksin skapa føroyska samfelagið.

**Ansingartrygd**

Tað eru kommunur, ið hava rokkið málinum at hava eitt ansingartilboð til teirra, ið ynskja tað. Men tað eru eisini alt ov nógvar, sum ikki hava nakað ansingartilboð at bjóða nýggju borgarum sínum. Millum hesar er eisini Tórshavn. Henda støða er ótolandi fyri tey, sum koma soleiðis fyri, at tey ikki sleppa til arbeiðis tá farloyvistíðin er komin at enda. Mammurnar føla seg ótryggar og stúra fyri um tað man eydnast at fáa eitt ansingarpláss, heldur enn at brúka tíðina til tað hon er ætlað. Javnaðarflokkurin vil í eini komandi samgongu slóða fyri, at ansingartrygd verður veitt øllum foreldrum. At barnaansingin er flutt til kommunurnar, má ikki merkja, at kommunurnar sjálvar kunnu gera av, hvussu tær raðfesta børnini.

At enda fari eg at endurtaka, at valskráin "Fólkið Fyrst" fer at kosta landskassanum 116 mio. So alt tosið frá Tjóðveldisflokkinum um oyðsl og útgjaringar frá Javnaðarflokkinum er púra burturvið, og er heldur ein undanførsla fyri førda politikkin seinastu fýra árini.